## Gravesen heimaftur uttan kilt

Síðan fyrradagin hevur tað ljóðað fyri heilt víst í donskum miðlum, at Thomas Gravesen nú skiftir stuttubuksurnar í Madrid við ein kilt í Skotlandi. Gravesen hevur verið í Glasgow og roynt fingið ein sáttmála í lag við Celtic. Men í gjár kom Gravesen til Danmarkar aftur, uttan nakran sáttmála við Celtic. Hetta merkir, at umboðsmaðurin hjá Gravesen hevur fingið skund, tí hóskvøldið á miðnátt letur flytigluggin aftur. Ekstrablaðið skrivar í dag, at orsøkin til, at sáttmálin ikki varð skrivaður undir var tann vanliga læknakanningin. Læknin fann okkurt galið við knænum hjá Gravesen, men ein nýggjur lækni skal síðani hava sagt gott fyri knænum. Tí er hóast alt møguligt, at Gravesen skiftir til Celtic hóast alt.



## Reytt kort fyri at stúta liðfelaga

Verjuspælarin Bradley Orr, sum spælir fyri enska felagið Bristol Vity, fekk í gjárkvøldið reytt kort í dystinum ímóti Northampton. Orsøkin var, at Orr stútaði ein liðfelaga í høvdið. Northampton skoraði tíðliga í dystinum, men Bristol City svaraði aftur. Stutt fyri hálvleik hevði Northampton ein stóran kjans, men málmaðurin bjargaði sera væl. Hetta leiddi til eitt kjak millum Orr og liðfelagan Carey, og tað endaði við, at Orr skallaði Carey. Dómarin gav Orr reyða kortið fyri hendingina. Bristol City vann tó dystin 3-1.

# Kasparov framvegis á toppinum

**Saman við trimum øðrum stórmennum telvaði Kasparov í Zürich Credit Suisse Blitz Tournament**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*carl_eli@hotmail.com*



*Superveteranurin, Korchnoi, ger enn um seg við talvborðið. Í Zürich gjørdist hann tó ov stuttur í dysti við Kasparov, Karpov og Polgar*

Garry Kasparov hevur ikki telvað nakað kappingartalv, síðani hann í mars 2005 boðaði frá, at hann gavst at telva professionelt. Kasparov segði tó, at hann til tíðir helst fór at telva kvikkappingar og snarkappingar.

Hinir telvararnir í Suisse Blitz vóru Anatoly Karpov, Viktor Korchnoi og Judit Polgar. Tey telvaðu tvær reisir móti hvørjum øðrum, og úrslitið varð hetta:

1 Garry Kasparov (2812) 4,5 stig av 6
1 Anatoly Karpov (2668) 4,5
3 Judit Polgar (2710) 2,5
4 Viktor Korchnoi (2600) 0,5

Hóast hann trein av pallinum fyri hálvum øðrum ári síðani, var tað ikki óvæntað, at Kasparov vann kappingina. Sum heimsins besti telvari sjálvur segði, so hevur hann hildið styrkina nøkunlunda við at telva nógv snartalv á netinum. Hann fylgir eisini væl við gongdini hjá Topalov og hinum mætu telvarunum í heimselituni.

Heldur óvæntað eydnaðist tað Karpov at gerast fremstur saman Kasparov. Karpov telvaði sum ein brandur og stóð seg eisini væl móti Kasparov (bæði talvini remis). Hjá Polgar gekk tað minni væl, meðan einki eydnaðist hjá superveteraninum Korchnoi.

### Ungu talentini vunnu á veteranunum

Við Magnus Carlsen á odda vunnu fimm ungir telvarar á fimm royndum telvarum. Henda serliga kapping endaði týsdagin. Samlaða úrslitið varð 28-22 til Carlsen & Co. Teir telvaðu tvær reisir móti hvørjum øðrum.

Sergey Karjakin (2679) og Magnus (2675) vóru oddamenn hjá talentunum. Hinir vóru Hao Wang (2610) úr Kina og hollendararnir Daniel Stellwagen (2575) og Jan Smeets (2532).

Alexander Beliavsky (2625), Arthur Jussupow (2617), John Nunn (2617), Ljubomir Ljubojevic (2551) og Ulf Andersson (2542) mannaðu eldra liðið.

Magnus fekk 6,5 stig av teimum 10 talvunum. Sama stigatal fekk Beliavsky. Karjakin fekk 6 stig. Magnus er nú millimetrar frá 2700 ratingmarkinum. Summi hava roknað seg fram til, at hann hevur 2699 eftir kappingina.

## Lyngby stongt leikvøllin

Veðrið í Danmark hevur verið so illfýsið seinastu tíðina, at fleiri fótbóltsdystir hava verið avlýstir. Ógvusligasta hendingin var tó í jútlandi, har ein ungur fótbóltsspælari doyði, tá ið eitt snarljós slóð niður og rakti hann. Í dag hevur felagið Lyngby latið leikvøllin hjá sær. Eingin sleppur inn á Lyngby Stadion, meðan veðrið er, sum tað er í, tí stúrt verður fyri, at vøllurin verður oyðilagdur, um vant ella spælt verður á vøllinum. Hetta hevur við sær, at steypafinalan hjá unglingum, sum skuldi spælast har í kvøld, er avlýst.

## Danmark hitar upp

Danska a-landsliðið skal um eina viku spæla fyrsta dystin í EM-undankappingini. Dysturin verður spældur ímóti Íslandi í Reykjavík. Fleiri lond spæla longu leygardagin, men tað ger Danmark ikki. Hinvegin hava danir avtalað ein venjingardyst ímóti Portugal fríggjakvøldið, og hesin dysturin skal verða seinasta fyrireikingin til dystin í Reykjavík.

## Hini londini spæla eisini

Meðan Føroyar og Skotland fara at takast í Glasgow leygardagin, skulu hini londini í okkara EM-bólki eisini spæla. Tveir dystir eru á skránni. Í Georgia skal Frakland royna at vinna sín fyrsta dyst, og Italia fær sama møguleika ímóti Litava á heimavølli.

## Snartíðindi

Ivan Sokolov vann 4th Staunton Memorial við 9 stigum av 11 møguligum. Michael Adams og Jan Timman vórðu nr. 2 við 8,5 stigum.

Vladislav Tkachiev vann herfyri franska meistaraskapin eftir umdyst við Laurent Fressinet. Óvæntað varð favoritturin Joel Lautier einans nr. 4

Aðalfundur Talvsambandsins verður 9. september í Lærarskúlahøllini kl. 13.00.

FM í snartalvi verður aftan á aðalfundin í Lærarskúlahøllini.

# Talvið hesa vikuna

Kasparov, G (2812) - Korchnoi, V (2600)
Champions Blitz Zurich 22.08.2006

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Rif3 Bb4+ 4.Bd2 a5 5.Ric3 b6 6.e3 Bb7 (Korchnoi telvar drotningaindisku byrjanina) 7.Bd3 0–0 8.0–0 d5 9.cxd5 exd5 10.a3 Bd6 11.Rie5 c5 12.f4 Ric6 13.Rib5 cxd4 14.exd4 Rie7 15.f5! Rie4? 16.Bxe4 dxe4 17.f6! (Ein náttúrligur, men somuleiðis sera sterkur leikur. Svartur verður skræddur sundur) 17...Bxe5 18.dxe5 Rig6 19.fxg7 Kxg7 20.Rid6 (Riddarin kemur væl við í spælið) 20...Ba6

Støðumynd eftir 20…Ba6



21.Bh6+! Kg8 (Tað hevði verði skák og mát um Korhnoi leikti Kxh6. Rif5+ er svarið) 22.Rf5 Fh4 (Korchnoi steingir sína frúgv inni, men støðan er kortini vónleys) 23.Bg5 1–0